## Reis teg upp

Orð & lag: Lisa Frederiksberg

*Tú so mangan hevur ynskt, at lívið meira einfalt var*
*Mangar gerðirnar tú gjørdi, so skeivar vóru tær.*
*So nógv lættari tað vildi verið, at liva honum lýðin.*
*Men Jesus hevur loysnina hjá tær.*

*Tá ið Jesus gekk á foldum, gjørdi væl og grøddi øll.*
*Mangan ynskti tú, hann gekk her niðri og flutti tíni fjøll.*
*Men eg skal heilsa tær mín vinur, at hann er ímillum okkum.*
*Men reisa teg, ja, tað mást sjálvur tú.*

Kór:
*Reis teg upp, reis teg upp.*
*Harrin ynskir hjálpa tær og vera tær so nær.*
*Reis teg upp, reis teg upp.*
*Lat ikki fallið verða grøvina hjá tær.*

*Tú skalt vita tað mín vinur, Jesus ynskir tær alt gott.*
*Tú skalt ganga trygt á degi, og tú hvíla skalt á nátt.*
*Gev nú Jesusi títt hjarta, vel at fylgja honum altíð.*
*Úr fallinum til sigur kemur tú.*

*Tað ljóðar kanska eitt sindur undarligt, men eg bað altso Gud um at geva mær ein sang til vígsluna av Kelduni.*

*Kann fløgan verða til uppmuntran, troyst og gleði fyri onkran, so var hon ikki givin út til fánýtis*



*Sølan av fløguni hevur gingið avbera væl, helst tí at høvuðslagið hevur verið so nógv spælt áðrenn tað yvirhøvur kom út. Her selir hon fløgur á Fjarðafestivalinum herfyri. Hon hevur síðani fingið eitt barn aftrat*

fekk Lisa, tá tann nýggja Keldan varð tikin í nýtslu fyri tveimum árum síðani, í september mánaðin 2004.

Hon ynskti her at geva samkomuni ein sang í sambandi við henda stóra dagin. Og hetta gjørdist sostatt hennara íkast til vígsluna av Kelduni.

- Tað ljóðar kanska eitt sindur undarligt, men eg bað altso Gud um at geva mær ein sang til vígsluna av Kelduni.

- Tja, eg veit ikki, men stutt eftir byrjaðu orðini at sjunga í høvdinum á mær – reis teg upp, reis teg upp.

- Eg setti meg niður við eini diktafon, og so kom teksturin allur sum hann var – og lagið eisini. Tað var ein serstøk løta, sigur Lisa.

### At koma aftur

Høvuðssangurin á nýggju fløguni varð soleiðis sungin til vígsluna, sum útvarpsrásin Rás 2 eisini sendi beinleiðis frá.

Hann varð síðani festur á band, og hevur síðani verið nógv umbiðin av lurtarunum, og er nú at kalla vorðin fólkaogn.

- Orðini eru einføld, og eg trúgvi at nógv fólk kunnu seta seg inn í tað sum sangurin snýr seg um – at lívið kann vera trupult og at Jesus kann tykjast langt burturi.

- Í slíkum umstøðum er gott at vita – og hoyra – at ein altíð kann koma aftur til Hansara. Hann er nær hjá hvørjum einstøkum!

Tá so fløgan kom uppá tal visti hon beinanvegin, at hetta skuldi eisini gerast heitið á fløguni: Reis teg upp.

### Til troyst

Ein annar av sangunum á fløguni er sangurin við tí gamla og kenda andaliga boðskapinum "Vend nú við". Hesin sangurin hevur eisini sína søgu.

- Tá eg avgjørdi at geva eina fløgu út, vildi eg fegin hava eitt nýtt lag við á hana.

- Eg royndi at finna fram til okkurt, men har kom barasta einki. Ikki fyrrenn hetta eina kvøldið í Kelduni, greiðir Lisa frá.

Hetta kvøldið skuldi hon leiða eitt møti í samkomuni. Fyrr um dagin kom hon fram til orðini og lagið til sjálvt niðurlagið ella kórið. Men spurningurin var kortini, um hetta var nóg mikið til at brúka á hesum møtinum.

Hon ynskti at fáa eitt ella fleiri ørindi til sangin, men hetta kvøldið varð so bert niðurlagið sungið. Seinni komu so tey trý ørindini til henda sangin, sum nú er at hoyra á fløguni.

- Fólk hava sagt mær, at tey hava lurtað eftir fløguni við gleði. Tað er sum um orðini eru góð og løtt at syngja hjá teimum.

- Kann fløgan verða til uppmuntran, troyst og gleði fyri onkran, so var hon ikki givin út til fánýtis, sigur Lisa.